


*Við fleiri enn 3.000 luttakarum eru oyggjaleikirnir nú størri enn vetrar-OL*

# Upplivingar-búskapur til smáoyggjar

**Oyggjaleikirnir hava síðani 1985 ment seg til at vera eitt risa-tiltak, um sammett verður við støddina á luttakandi londunum**

**OYGGJALEIKIR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað varð hildið at vera stórt, tá fyrstu oyggjaleikirnir vórðu sendir av barkastokki á Isle of Man fyri 22 árum síðani. 12 luttakandi lond við í alt 800 ítróttarfólkum var í øllum førum meira, enn tey á ensku kanal-oynni høvdu tikið ímóti undan hesum, men longu eftir fyrstu royndina stóð greitt, at talan skuldi verða um afturvendandi tiltak.

Snøgt sagt, so var talan um eina brakandi succés, og síðani er tiltakið vorðið størri og størri í vavi, so hvørt sum leikirnir hava ferðast kring oyggjarnar. Higar til við Isle of Man og Guernsey sum einastu støðini, har leikirnir hava verið tvær ferðir.

Soleiðis var luttakaratalið í Føroyum í 1989 komið upp á 1.500, og í ár er talið fyri fyrstu ferð komið upp um tey 3.000. Og hóast hetta neyvan er nóg mikið til at imponera nakran Rhodos-búgva, har túsundtals ferðafólk koma hvønn tann einasta dag. Men hjá øðrum londum er talan sanniliga um upplivingarbúskap við lít. Bæði tí stóra talið av luttakarum, leiðarum og áskoðarum setir krøv til gistingar- og matstovuvinnuna. Men eisini tí avleidda virksemið er stórt, tá ítróttarfasilitetir verða um- og útbygdir.

Eisini Føroyar eiga sín stóra part í hesum. Og tað hevur avgjørt eisini havt sína ávirkan á almennu topparnar. Soleiðis er løgmaður partur av ferðalagnum næstu leikirnar á rað. Bæði ið leiklutinum sum verji fyri ítróttin, men uttan iva eisini við atliti at fáa íblástur frá øðrum smátjóðum. Og so sjálvandi eisini sum íðin áskoðari, sum í eina viku vitjar runt hjá øllum føroysku ítróttarfólkunum, meðan hesi kappast fyri at vinna Føroyum heiður og æru.

## FAKTA

**Føroyar hava verið við á Oyggjaleikunum øll árini, síðani leikirnir byrjaðu í 1985**

Føroyar hava vunnið hesi heiðursmerki

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Isle of Man 1985 | 0 | 2 | 1 |
| Guernsey 1987 | 1 | 2 | 5 |
| Føroyar 1989 | 13 | 5 | 10 |
| Áland 1991 | 6 | 10 | 11 |
| Isle of Wight 1993 | 5 | 5 | 13 |
| Gibraltar 1995 | 10 | 14 | 15 |
| Jersey 1997 | 5 | 10 | 22 |
| Gotland 1999 | 7 | 12 | 9 |
| Isle of Man 2001 | 15 | 12 | 13 |
| Guernsey 2003 | 6 | 10 | 12 |
| Hetland 2005 | 14 | 11 | 20 |

**Oyggjaleikirnir eru vaksnir munandi, síðani fyrstu leikirnar í 1985.**

| | Ítróttargreinar | Oyggjar | Ítróttarfólk |
|---|---|---|---|
| Isle of Man 1985 | 7 | 15 | 700 |
| Guernsey 1987 | 9 | 18 | 1049 |
| Føroyar 1989 | 11 | 15 | 800 |
| Áland 1991 | 13 | 17 | 1500 |
| Isle of Wight 1993 | 14 | 19 | 1448 |
| Gibraltar 1995 | 14 | 18 | 1214 |
| Jersey 1997 | 14 | 19 | 2000 |
| Gotland 1999 | 14 | 22 | 1858 |
| Isle of Man 2001 | 15 | 22 | 2020 |
| Guernsey 2003 | 15 | 23 | 2129 |
| Hetland 2005 | 15 | 24 | |
| Rhodos 2007 | 14 | 25 | 3000 |

Sosialurin